# 100 milliónir í kassan

**Desember mánaði var góður fyri skattainntøkuna hjá Klaksvíkar kommunu, og 2001 var metár**

PENGAR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Ongantíð áður hava klaksvíkingar goldið so nógv í skatti sum í farna ári.

Skattainntøkan hjá Klaksvíkar kommunu kom upp á hundrað milliónir krónur, og tað vóru fimm milliónir fleiri, enn roknað varð við á fíggjarætlanini fyri 2001.

Besti mánaðin hjá Klaksvíkar kommunu nakrantíð var desember mánaði í fjør, tá skatturin lá um 13 milliónir krónur. Besti mánaðin frammanundan hesum var desember mánaði í 2000, tá inntøkan var stívliga 12 milliónir.

### Fyrr enn væntað

Klaksvíkar kommuna hevur í fíggjarætlanini fyri 2002 roknað við eini skattainntøku upp á 97 milliónir krónur. Tá fíggjarætlanin var til viðgerðar í býráðnum varð tosað um, at møguleikar vóru fyri, at skattainntøkan fór at runda 100 milliónir í 2002.

Veruleikin gjørdist tó tann, at hetta tal náddi skatturin longu, tá árið 2001 var av.

Virksemið í Klaksvík er stórt, og sum aðrastaðni í landinum hava virki og fyritøkur trupult við at finna fólk.

# – Ætla ikki at ganga ímóti Umboðsmanninum

**– Vit halda, at skipanin við Løgtingsins Umboðsmanni góð, og Fíggjarmálastýrið æltar sær avgjørt ikki at sáa iva um álitið hjá honum, sigur Thomas Magnussen**

UMBOÐSMAÐURIN
*Eyðun Klakstein*

– Fíggjarmálastýrið heldur, at skipanin við einum umboðsmanni er ein góð skipan, og Fíggjarmálastýrið ætlar sær avgjørt ikki at sáa iva um álit hjá Løgtingsins Umboðsmanni, ella at viga umboðsmannin.

Tað sigur Thomas Magnussen, sum er leiðari á Lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum.

Fíggjarmálastýrið fekk í november mánaði eitt álit frá Løgtingsins Umboðsmanni um eitt mál, har Umboðsmaðurin helt, at mannagongdin hjá Fíggjarmálastýrinum ikki var í lagi.

Hesa mannagongd vil Umboðsmaðurin hava Fíggjarmálastýrið at taka upp til nýggja meting.

### Størri arbeiði

Hetta er ikki gjørt enn, men leiðarin á Lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum vísir aftur, at tað merkir, at Fíggjarmálastýrið ikki ætlar sær at fylgja álitinum uttan víðari.

– Málið hjá Umboðsmanninum var eitt konkret mál um løn til fyrrverandi tænastumann, sum eisini fekk eftirløn. Málið er ikki aktuelt longur, og Umboðsmaðurin biður ikki um, at tað konkreta málið verður tikið upp aftur ella at Fíggjarmálastýrið ger nakað ávíst.

– Í álitinum heitir Umboðsmaðurin hinvegin á Fíggjarmálastýrið um generelt at taka spurningin um munarløn til umhugsunar av nýggjum.

– Tað er eitt størri arbeiði sum ikki er liðugt enn. Tá ein tíðindamaður spurdi eftir málinum, bar tí ikki til at siga annað enn at málið var ikki liðugt viðgjørt. Meiri er ikki í hesu søgu, sigur Thomas Magnussen, leiðari á Lønardeildini.

# Landskassin høggur niður á pensjónistar sum arbeiða

**Pensiónistur á Tvøroyri hevur mist yvir 1.600 krónur av pensjónini tí hann hevur egnt nakrar stampar fyri útróðrarbát, hóast pensjónistar næstan eru teir einastu, sum tíma at egna**

PENSJÓNIR
*Áki Bertholdsen*

Mangan verður tikið til, at tað loysir seg ikki at arbeiða. Yvirhøvur er lítil sannleiki í hesum. Men tað er ein samfelagsbólkur, har tað í hvussu so er loysir seg ómetaliga illa at arbeiða. Og tað er tann samfelagsbólkur, sum frammanundan fær minst, nevniliga pensjónistarnir.

– Tað er so galið, at rættir ein pensjonistur hond frá síðu fyri at tjena sær nøkur oyrur eyka, høggur landskassin niður á hann beinanvegin, tí so verður ein fittur partur av pensjónini tikin frá honum.

Hetta hava teir í egningarskúrðinum hjá útróðrarbátinum Herdis á Tvøroyri, sannað.

Har eru eisini onkir pensjonistar farnir at egna fyri at stytta sær stundir og samstundis fyri at forvinna sær nøkur oyru afturat pensjónini. Men úrslitið, teir fáa burturúr er, at teir koma at betala nógv meiri skatt av pensjónini, enn teir plagdu og tí loysir tað seg so illa at arbeiða, at teir eru um at tveita frá sær.

– Og eitt skal vera púra vist, at rýma pensjónistarnir úr egningaskúrðunum kring landið, liggur hvør einasti línubátur beinanvegin, tí tað er svarta hopleyst at fáa egnarar og pensjónistar eru teir einastu, sum hava tímað at egnt, siga teir.

Tølini niðanfyri er eitt ítøkiligt dømi um, hvørjar avleiðingar tað fær fyri ein pensjónist, sum hevur heilsu og áræði til at bróta upp um armar og at tjena sær nøkur oyru- og samstundis rætta eina hjálpandi hond til útróðrarmenn, sum annars ikki fáa línuna egnda.

Talan er um ein pensjónist, sum er giftur og so tí fær lægstu pensjón. Konan arbeiðir ikki.

Í oktober, november og desember í fjør hevur hann egnt fyri tilsamans 13.200 krónur.

Men afturfyri hevur hann betalt yvir 1.600 krónur meiri í skatti av fólkapensjónini, enn hann plagdi at betala.



*Fólkapensónistur á Tvøroyri misti næstan triðingin av pensjónini í seinasta mánaða tí hann hevur egnt. Hetta er at revsa teir pensjónistar, sum forvinna sær nøkur oyru eyka, hóast næstan ongin annar tímir at egna, heldur hann*

– Eg havi onki ímóti at betala skatt av tí, eg egni fyri. Men tað er eitt stórt vónbrot at skattur haraftur-at eisini skal dragast av pensjónini av tí at eg fái nøkur oyru framíhjá, sigur hann.

Hann sigur, at hann fær 3.313 krónur í fólkapensjón um mánaðin, umframt eina viðbót uppá 1.420 krónur, ella tilsamans 4.733 krónur í fólkapensjón.

Vanliga plagar hann at betala ímillum 300 og 400 krónur í skatti av pensjónini.

Harumframt fær hann 620 krónur um mánaðin úr samhaldsfasta og av tí hevur hann betalt 100 krónur í skatti.

Sostatt fær hann tilsamans 5.353 krónur í pensjónum um mánaðin og av tí betalir hann ímillum 400 og 500 krónur í skatti, so eftir eru ímillum 4.853 krónur og 4.953 krónur at liva fyri.

### Triðingin av pensjónini í skatti

Nú fer hann so at egna. Fyrstu lønina fær hann 5. oktober og hon var uppá 2.500 krónur. Av tí betalti hann 188 krónur í skatti. 1. november fær hann 1.700 krónur í løn og betalir 310 krónur í skatti. 29. nov-ember fær hann 3.900 krónur í løn og betalir 924 krónur í skatti og beint fyri jól, 21. desember, fær hann 5.100 krónur í løn og betalti 1.507 krónur í skatti.

Men tá ið hann fær pensjónina, fekk hann ein hvøkk, tí tá ið hann fær pensjón 27. november, eru 807 krónur tiknar í skatti, ella meiri enn tvær ferðir so nógv sum vanligt.

Og tá ið hann so aftur fær pensjón 18. desember, eru 1.274 krónur tiknar av í skatti. Í desember varð sostatt næstan øll pensjónsviðbótin upp á 1.420 krónur tikin aftur í skatti.

Sama skilið var við samhaldsfasta. 30. november fekk hann tær vanligu 620 krónurnar, men hesuferð vórðu 167 krónur tiknar í skatti ístaðin fyri 100 krónur sum vanligt. Og tá ið hann aftur fekk samhaldsfasta útgoldnan 30 desember, vóru 296 drignar frá í skatti.

Hetta heldur pensjónisturin verða smáligt av landskassanum, soleiðis at revsa pensjónistar fyri at arbeiða.

– Umframt skattin av egningarlønini, havi eg eisini goldið næstan triðingin av desember pensjónini í skatti.

Hann sigur, at nú Landsstýrið hevur tikið pensjónsmálið upp, átti tað avgjørt verðið soleiðis, at pensjónirnar blivu skattafríar, sigur hann.

– Pensjónin er so lítil frammanundan, at tað gjørdi onki, um landskassin unti teimum pensjónistum, sum hava heilsuna til tað, at teir forvunnu nøkur oyru eyka, uttan at revsa teir afturfyri við at leggja eykaskatt av pensjónina.

– Tað er eisini ein uggi hjá nógvum pensjónistum, at teir kunnu sleppa út ímillum fólk eitt sindur, serliga tá talan er um eitt arbeiði, sum ongin annar tímir at gera, leggur hann afturat.



# Seldu fyri 1,6 milj. krónur netto

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánakvøldið um 19-tíðina komu trolararnir, Stjørnan og Polarhav, aftur á Runavík eftir, at skipini høvdu verið á fiskamarknaðinum í Hanstholm við fyrstu føroysku ísfiskalastini yvirhøvur í hesum nðggja ári. Teir fóru úr Hanstholm um middagin leygardagin.

Í Runavík skiftu teir fólk, og okkurt smávegis skuldi gerast. Síðan fóru teir avstað aftur um 23-tíðina hetta sama kvøldið.

Seks mans eru umborð á hvørjum skipi hvønn túrin. Teir hava tríggjar manningar, so tilsamans eru 18 mans knðttir at Polarhavi og Stjørnuni.



*Polarhav og Stjørnan vóru á Runavík kl. 19 mánakvøldið. Teir skiftu fólk og loystu aftur kl. 23.*

### Góð ísfiskasøla

Teir, sum eiga skipini, eru væl nøgdir við søluna í Hanstholm. Veiðan vá 350.000 pund. At kalla alt var upsi, meginparturin upsi 3. Bruttosølan var 1,8 milj. krónur. Hetta svarar til umleið 1,6 milj. krónur netto, og tað er ein góð søla.

Miðalprísurin lá nakað omanfyri 10 kr. fyri kg. brutto. Besti prísurin var umleið 13 kr. fyri kg., og vánaligasti prísurin var niðri á 9 kr. fyri kg.

Sum skilst, verður fiskurin skorin til flak og seldur feskur á evropeiska marknaðin.

# Gongd komin á aftur í Saltangará

**- Tað er ikki rætt, at leirvíkstrolararnir høvdu fingið tað sama fyri upsan á føroyska marknaðinum, sum teir fingu í Hanstholm, sigur virkisleiðari**

*Vilmund Jacobsen*

**Saltangará:** Góði upsafiskiskapurin og raskir fiskimenn hava syrgt fyri, at flakavirkini kring landið ikki lógu í fiskaloysi leingi, nú vit eru farin inn í eitt nýtt ár.

Trolarin, Fram, sum partrolar saman við Vestmenningi, landaði til Fiskavirking í Saltangará mánadagin. Teir høvdu góð 180.000 pund, harav virkið í Saltangará keypti tey 130.000 pundini. Restin, eini 46.000 pund, varð seld um uppboðssøluna.

Sagt verður í Saltangará, at upsin var góður.

Fram og Vestmenningur, sum landaði í Vestmanna og hevði á leið tað sama, royndu í seks dagar.

### Grønanes í dag

Grønanes landar í Saltangará í dag. Teir hava eini 160.000 pund, og væntandi er upsastøddin tann sama sum hjá Fram. So, hetta er framvegis góður upsi.

Tey vóru til arbeiðis á Fiskavirking í Saltangará mánadagin, og tá ið vit frættu týsmorgunin, vóru útlit til eina hampiliga góða viku.

- Væntandi røkkur fiskurin hjá Grønanesi nakað út á hósdagin, og ikki er óvist, at okkurt ikki verður fríggjadagin eisini, søgdu tey í Saltangará.

### Ikki sama prís

Onkur hevur róð uppundir, at Stjørnan og Polarhav, sum seldu í Hanstholm mánadagin, høvdu fingið sama nettoprís, um teir seldu lastina í Føroyum, tí trolararnir vóru teir fyrstu, sum landaðu eftir ársskiftið.

- Men sambært teimum prísum, eg havi skilt, at teir fingu í Hanstholm, er hetta ikki rætt, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari, sum heldur, at tað hevði verið torført at fingið tað sama fyri upsan á føroyska marknaðinum.

Upsin hjá leirvíkstrolarunum var smáttfallandi hendan túrin, og sambært Jasoni, er tað serliga hendan upsan, danir vilja hava.

# Vestmenningur og Vesturbúgvin í Vestmanna

**Í Vestmanna arbeiða tey aftur við tvey-skiftivakt. - Tú noyðist at tryggja tær fisk til í minsta lagi tríggjar dagar, tá ið farið verður undir at arbeiða við skiftivakt, tí hetta krevur sáttmálin**

*Vilmund Jacobsen*

**Vestmanna:** Vestmenningur, sum partrolarar við Fram, landaði í Vestmanna mánadagin. Tilsamans høvdu skipini 360.000 pund av góðum upsa, harav Vestmenningur hevði umleið helmingin í sínari last. Fiskavirking í Vestmanna keypti meginpartin av lastini hjá Vestmenningi, men eins og hjá Fram, fór eisini ein partur av lastini hjá Vestmenningi um uppboðssøluna.

Skipini fóru út nýggjárskvøld. Tey royndu í seks dagar.

### Vesturbúgvin undir lúkurnar

Í dag landar Vesturbúgvin í Vestmanna. Teir partrola við Eysturbúgvanum, sum vanliga landar á Sandi. Sagt verður, at skipini eru full undir lúkurnar. Tey hava roynt eystanfyri, og væntandi er slagið tað sama ˆ góður upsi - sum hjá hinum skipunum, ið hava roynt á somu leið.

Tey vóru ikki til arbeiðis á Fiskavirking í Vestmanna mánadagin, men týsdagin fóru tey aftur til verka við tvey-skiftivakt, sum í minsta lagi varar í tríggjar dagar.

### Tilrættalegging

- Tá ið arbeitt verður við tvey-skiftivakt, skal sambært sáttmálanum í minsta lagi arbeiðast í tríggjar fylgjandi dagar. So, hetta krevur eina neyva tilrættalegging.

Í Vestmanna hava tey leingi arbeitt við tvey-skiftivakt, og hetta er eingin trupulleiki, tá ið nógvur fiskur kemur uppá land.

Men er ivingarsamt við fiski, kann tað vera eitt sindur truplari at leggja arbeiði til rættis.

- Tú noyðist í øllum førum at hava tryggjað tær fisk til tríggjar dagar, tá ið farið verður undir at arbeiða við skiftivakt, tí hetta krevur sáttmálin, siga tey í Vestmanna.


GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 1.6 GX** reyður, 4 hurðar, árg. 1998. | 100.000 |
| **Nissan Primera 1,6 LX** grønur, 4 hurðar, árg. 1995, 71.000 km. | 75.000 |
| **Nissan King Cab 4x4** Diesel gráur, 2 hurðar, árg. 1996. | 78.000 |
| **Peugeot 306 Turbo Diesel** reyður, 4 hurðar, árg. 1998, 86.000 km. | 104.000 |
| **Peugeot 405 GR** 1,9 Diesel St. car vínreyður, 5 hurðar, árg. 1995, 124.000 km. | 79.000 |
| **Opel Corsa 1,4** bláur, 3 hurðar, árg. 1995. | 60.000 |
| **Opel Astra 1,8 Club** Wagon grønur, 5 hurðar, árg. 1995, 104.000 km. | 70.000 |
| **Opel Astra 1,4** bláur, 3 hurðar, árg. 1997, 97.000 km. | 70.000 |
| **Opel Astra 2,0 TDi Comfort** brúnur, 5 hurðar, árg. 1998, 75.000 km. | 119.000 |
| **Opel Astra 1,7TD Wagon** beige, 5 hurðar, árg. 1997, 150.000 km. | 85.000 |
| **Opel Astra 1,7TD Wagon** vínreyður, 5 hurðar, árg. 1996, 58.000 km. | 75.000 |
| **Opel Astra 1,7TD Wagon** grønur, 5 hurðar, árg. 1995, 89.000 km. | 65.000 |
| **Opel Astra 1,6 Club Wagon** bláur, 5 hurðar, árg. 1998, 50.000 km. | 109.000 |
| **Citroen ZX Volcane** reyður, 5 hurðar, árg. 1991, 130.000 km. | 25.000 |
| **Citroen Xsara** 1,8 Coupe gulur, 2 hurðar, árg. 1998, 51.000 km. | 87.600 |
| **VW Golf 1,6 Diesel** gulur, 3 hurðar, árg. 1998. | 19.000 |
| **VW Golf 1,6 Diesel** gráur, 3 hurðar, árg. 1990, 135.000 km. | 25.000 |
| **Toyota Corolla 1,3** hvítur, 4 hurðar, árg. 1995. | 55.000 |
| **Toyota Carina E 2,0 TD** hvítur, 4 hurðar, árg. 1997, 243.000 km. | 110.000 |
| **Toyota Carina E 1,6** brúnur, 4 hurðar, árg. 1993, 122.000 km. | 61.000 |

Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin